## HA vil samráðast

Hells Angels og kriminellu innflytarabandar í Keypmannahavn hava eftir øllum at døma lagt vápnini fyri eina stund og vilja í staðin tosa saman. Tað vil verjuadvokaturin, Thorkild Høyer, vera við. – Eg kann vátta, at HA hevur seriøsar ætlanir um at fáa málið loyst. Eg kann ikki siga nakað meiri ítøkiligt, men tað er mín greiða kensla, sigur han við politiken.dk



## Vantandi donsk útgerð drap enskar hermenn

Tveir enskir hermenn doyði tí donsk útgerð ikki megnaði at fyribyrgja, at ein fjarstýrd bumba kundi brast.
Hetta er komið fram í Bretlandi um eina hending í Helmand økinum í Afghanistan í septembur í fjør, tá tveir enskir hermenn doyðu. Bilurin hermenninir koyrdu í hevði ikki útgerð til hetta, men valdu at fylgjast við einum donskum bili, í teirri trúgv, at danski bilurin vardi teir. So var ikki og bilurin fór í luftina. Nú hava bretar avgjørt at øll bretsk akfør mugu hava tílíka verju.

# Høgni Hoydal kundi ikki liv

**Løgmaður tók eina skrivstovu frá einum fulltrúa í uttanríkisráðnum hjá Høgna Hoydal og tað vildi Høgni Hoydal ikki góðtaka. Tí gav hann boð um at starvsfólkið hjá uttanríkisráðnum skuldi hava skrivstovuna aftur, tí annars kundi hann ikki liva við sær sjálvum. Tað endaði við at lásið varð borað út. Vit prenta samskiftið um umstríddu skrivstovuna niðanfyri, so at lesarin sjálvur kann gera sær eina meting av støðuni**



SKRIVSTOVUMÁLIÐ

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tað vóru eini tænastuboð frá Hoydal, sum førdi til, at brotið var inn í eina skrivstovu í Tinganesi.

Tað framgongur av einum uppriti hjá stjóranum á løgmansskrivstovuni, Marjuni Hanusardóttir, sum hon hevur skrivað 5. september.

Tað er hon sjálv sum nevnir hendingina eitt innbrot.

Vit hava nú fingið innlit í skjølini, sum eru til taks í sambandi við nógv umstrídda skrivstovumálið í Tinganesi, sum løgmaður sigur, var dropin, sum fekk bikarið at flóta yvir, so at hann segði samgonguna við Tjóðveldið upp.

Í uppritinum sigur Marjun Hanusardóttir, at hon var inni á gólvinum hjá Herlufi Sigvaldsson, virkandi aðalstjóra í uttaríkisráðnum "í sambandi við, at uttanríkisráðið hevur brotið seg inn í skrivstovuna hjá Peturi Petersen og sett Bjørn Kunoy í hesa skrivstovu".

Marjun Hanusardóttir fór at tosa við aðalstjóran, "tí henda avgerð teirra gongur beint ímóti avgerðini hjá løgmanni, ið varðar av ognunum í Tinganesi".

Marjun Hanusardóttir sigur, at hon vildi hava at vita, hvussu hetta hekk saman.

- HS (Herluf Sigvaldson) greiddi mær frá, at hann hevði fingið munnlig tænastuboð frá landsstýrismanninum, Høgna Hoydal, um at syrgja fyri at fáa BK (Bjørn Kunoy) inn aftur í skrivstovuna hjá PP. HS hevur síðani givið boð um at fáa atgongd til skrivstovuna og givið BK munnlig tænastuboð um at seta seg har í morgun.

Herluf Sigvaldsson vildi ikki fortelja henni, hvør hevði brotið lásið upp og sett nýtt lás í.

Men "hann legði dent á, at hann altíð fer at gera tað, sum hansara landsstýrismaður gevur sær boð um"

"Hann hevði eisini sum rættur embætismaður greitt landsstýrismanninum frá, hvat ein slík gerð kundi elva til politiskt".

Hetta er ikki einasta orrusta, sum er um umrøddu skrivstovu, tí sama dag, 5. september, skrivar Kristianna Sjóvará upprit "um hending í sambandi við læsta skrivstovu 1. september 2008"

Hon skrivar:

Sunnudagin 31. august 2008 gav løgmaður boð um at gera skrivstovu klára til Petur Petersen, fyrrverandi aðalstjóra, og at tað skuldi vera skrivstovan, sum Bjørn Kunoy, fulltrúi, var fluttur inn í. Marjun Hanusardóttir, løgmansstjóri, skuldi tosa við Herluf Sigvaldsson, virkandi aðalstjóra, og biðja hann geva BK (bjørn Kunoy, blm.) boð. Til tess at geva BK møguleika at flyta síni ting sjálvur, var bíðað til seinni um kvøldið, áðrenn tingini hjá BK vóru flutt í granna skrivstovuna, har BK hevði havt skrivstovu beint frammanundan.

Mánamorgun 1. september (umleið kl. 8.30) hoyrdi eg áhaldandi larm á ovaru hæddini. Eg fór tí upp at vita, hvat var áfatt. Tá stendur ein lásasmiðjur og borar í lásið til skrivstovuna, sum var fyrireikað til PP. BK hyggur at. Eg spurdi hvat var áfatt, og at soleiðis var ikki rætt at bera seg at. BK segði, at hann hevði fingið boð frá sínum stjóra at bora lásið upp, so hann kundi sleppa inn á skrivstovu sína, og at hann var sera ónøgdur og illur, at hansara lutir uttan hansara samtykki vóru fluttir. Eg spurdi um hann ikki hevði fingið nøkur boð um hetta, tí eg visti at Jóannes Eidesgaard, løgmaður, hevði givið boð til Høgna Hoydal, landsstýrismann, og at M. Hanusardóttir hevði tosað við H. Sigvaldsson. Tað kendi BK einki til, men fór í staðin eftir avtaluni millum løgmann og HH (Høgna Hoydal, blm.) frá februar mánað. Tá eg fekk at vita, at HS og HH vóru inni á skrivstovuni, fór eg yvir at spyrja, um løgmaður ikki hevði tosað við HH. Jú, løgmaður hevði sent sms, men HH (Herluf Sigvaldsson, blm.) var ikki samdur við løgmann, segði hann.

HS og eg fóru út á gongina, har BK bað lásasmiðin halda fram at bora, meðan eg bað hann steðga til málið var greitt. Sylindarin í lásinum var nú oyðilagt, og ongin slapp sostatt inn á tómu skrivstovuna. HS bað lásasmiðin senda rokningina til UR. Víðari segði HS við einum smíli, at løgmaður fór at hava ein trupulleika, tá fjølmiðlarnir fingu at vita um hetta mál.

Tann 3. september skrivar Høgni Hoydal til Jóannes Eidesgaard:

Eftir tær sera margháttligu hendingarnar seinastu dagarnar er øllum greitt, at okkurt álvarsligt skal gerast til tess at rætta viðurskiftini í Tinganesi.

Eg kann í fyrsta lagi, hvørki góðtaka ella liva við, at starvsfólk verða viðfarin soleiðis, at tey verða koyrd úr síni skrivstovu uttan nakra ávaring, semju ella grundgeving. Hetta er ein heilt óhoyrd framferð, sum sjálvsagt setir djúp spor í alt arbeiðslag og viðgerðina av týdningarmiklum málum í embætisverkinum.

Í øðrum lagi er sera ilt at síggja nakra grundgeving fyri, at teir hølistrupulleikar, sum vit sita við, har leiðandi starvsfólk als onga skrivstovu hava, verða gjørdir uppaftur truplari, hóast fleiri høli standa tóm í Skansapakkhúsinum. Og eg endurtaki, at eg havi ongan trupulleika av at sita í interimistiskum umstøðum á loftinum til tess at kunna arbeiða, til ein varandi loysn er funnin á hølisviðurskiftunum.

Heldur ikki kann eg á nakran hátt skilja, at hetta kann fara fram millum politiskar samstarvsfelagar – ella at tað yvirhøvur er eitt mál, ið verður viðgjørt á politiskum stigi.

Vit hava ovmikið av politiskum málum at loysa og stríðast við, og skulu á ongan hátt nýta orku til at stríðast um tílíkar spurningar.

Ein avtala varð gjørd og undirskrivað av okkum báðum í februar mánaði um, hvussu vit skipaðu okkum við starvsfólki og hølum í Tinganesi til vit fingu eina varandi loysn á hølisviðurs kiftunum. Longu tá tyktist støðugt sum at okkurt ónannsakiligt stríð tók seg upp, hóast tað skjótt kann staðfestast, at tað eru ikki hølir ella fermetrapláss, ið vanta í Tinganesi, í teirri fyribilsloysnini, vit gjørdu av at gera.

Hetta var tað, sum eg ynskti at fáa lagt á borðið á fundi millum allar tengdar persónar, tá ein slík opin tvístøða, tók seg upp.

Tað eydnaðist so ikki í gjár, men eg heiti enn einaferð á teg um beinanvegin at hava ein slíkan fund, har embætisfólkini eru við, so takast kann um rótina á trupulleikanum. Tí uttan mun til, um okkara ráð sita annað á mánanum og hitt í Víkarbygri – so skal samstarvast og greið viðurskifti valda um uppgávur og mál.

Mær tykir hetta sum eitt stríð um territorium, vald, ótta fyri at missa, gomul stríðsmál o.s.fr. Og tað má vera okkara skylda, at fáa viðgjørt tað opið og koma víðari.

Tað er óneyðugt at siga, at fortreytin fyri at fáa viðurskiftini í rættlag nú, er, at støðan viðvíkjandi hendingini mánamorgunin, verður normaliserað beinanvegin.

Eg havi tí gjørt av, at tað starvsfólkið, ið hevur verið fyri óræetti, sjálvandi má fáa sína skrivstovu aftur í morgin árini – og at tit ístaðin kunnu nýta mína skrivstovu til tykkara starvsfólk, so ongin verður fyri óræetti av hesum.

Eg geri klárt at flyta beinanvegin.

Samstundis seta vit alla orku inn til at loysa hølistørvin varandi sum skjótast.

Dagin eftir, tann 4. september, skrivar løgmaður aftur til Høgna Hoydal:

Fyri stutt at taka samanum fundin týsdagin á skrivstovu míni: